# LEIKSKRÁ

13. MAI 2021

SKRÁ NR. 03



## 10. UMFAR

HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Boks 81 • 530 Fuglafjørður
tel. 41 44 00 • fax 41 44 01
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo



# ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR

Fløtugerði - 530 Fuglafjørður
tel. 228771 - if@if.fo - www.if.fo

**Útgevari og ábyrgd**
ÍF-fótbóltur - Atli Petersen

**Sniðgeving og uppseting**
Maibritt P. Bærentsen.


betri.fo
Betri tannár
Til tín millum 13 og 17 ár
Kort
Netbanki
Nýtslukonta
Uppsparingarkonta
Boðtænasta
Fá ein ryggsekk, tá tú bíleggur títt fyrsta kort
Vitja eina av deildum okkara
betri

# INNIHALD


Dysturin í dag

Støðan í Betri-deildini

9. umfar: Víkingur - ÍF

TEAM ÍF Leikarar

TEAM ÍF Venjarar o.a.

TEAM B36

Dómarar

Hvat bagir ÍF liðnum?

Málskorðarar eftir 9. umfar

Leikarin hesarferð

ÍF kvinnurnar í 1. deild

Støðan í 1. deild hjá kvinnum

ÍF-sangurin

ÍF-fjeppara KVØLD

INTERSPORT®
intersport.fo

taf.fo
the athlete's foot®



TEKST: **EIVIN BREIÐASKARÐ**

# DYSTURIN Í DAG

Nú er 10.umfar í ársins kapping í Betri-deildini á skránni, og í dag bjóða vit árstalsfelagnum úr høvuðstaðnum – B36,  vælkomið í Fløtugerði til spennandi dyst ímillum nr. 5 og nr. 7 á stigatalvuni.

Eftir lemjandi 1-5 ósigur í Norðagøtu sunnudagin 9.mai, skulu okkara leikarar í dag royna at reisa seg og hála ein sigur í hús ímóti einum hvítum og svørtum B36-liði, sum hevur fingið eina eitt sindur trilvandi byrjan uppá kappingarárið.

B36 hevur áðrenn dagsins dyst skava sær 13 stig saman, og hetta er komið við 3 sigrum, 4 javnleikum og einans 2 tapum. B36 hevur ein málmun sum eitur 13-12.

Okkara dreingir fingið 8 stig higartil, og hesi stig eru komin við 2 sigrum, 2 javnleikum og 5 taptum dystum. Málmunurin hjá ÍF eitur 13-26, so tað er ikki torført at síggja, hvar trupuleikin á ÍF-liðnum er. Tað fara ov nógv mál ígjøgnum, og tí má verjuparturin hjá IF arbeiðast við hesi komandi umførini. Byrjast má í dag.

Somu lið spældu 2-2 á Tórsvølli 2.mai, har B36 gott nokk mestsum gav ÍF 2 mál, men sigast skal eisini, at greinaskrivarin legði tilmerkis eitt B36 lið, sum als ikki er á tí støði, sum man vanligt roknar hetta sigursvanda lið at verða. Óiva er ein nýggj liðuppbygging í gongd, og tí kann nokk ikki roknast við, at B36 verður heilt frammi í oddinum í landskappingini í ár.

Væntanirnar til dagsins dyst eru góðar, og stuttligt hevði verið, um vit eftir dystin kunnu fegnast um 3 kærkomin stig, tí botnurin spøkir, og stutt er niður á 9.pláss, sum eisini er torført at koma burturúr.

Torført er at hugsa sær, at topp 5 og botn 5 fara at síggja øðrvísi út í ár í mun til mongu undanfarnu árini, men um ÍF uppá nakran máta skal nærkast topp 5, so er ein sigur í dag eitt krav.

Tað er nú, at ÍF aftur skal vinna ein dyst, tí í Fløtugerði eigur ÍF at geva øllum liðum ein skarpan gang. Hevði høvuðsvenjarin bara havt dirvi til at brúkt teir leikarar, sum eru uppvaksnir í felagnu, fyrst og fremst, so varð tað kanska ein gongd leið til at skapa menning fyri liðið, ja í grundini alt felagið. Koma leikarar inn frá øðrum feløgum fyri pengar, so má roknast við, at hesir leikarar eru betri enn okkara egnu. **That´s remain to be seen!!!!**




## EFTIR 9. UMFAR

# STØÐAN

## Í BETRI-DEILDINI HJÁ MONNUM

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 9 | 8 | 1 | 0 | 31 | 4 | +27 | 25 |
| 2 | HB | 9 | 6 | 2 | 1 | 29 | 7 | +22 | 20 |
| 3 | Víkingur | 9 | 5 | 3 | 1 | 21 | 8 | +13 | 18 |
| 4 | NSÍ | 9 | 5 | 2 | 2 | 19 | 12 | +7 | 17 |
| 5 | B36 | 9 | 3 | 4 | 2 | 13 | 12 | +1 | 13 |
| 6 | EB/Streymur | 9 | 2 | 3 | 4 | 9 | 16 | -7 | 9 |
| 7 | ÍF | 9 | 2 | 2 | 5 | 13 | 26 | -13 | 8 |
| 8 | 07 Vestur | 9 | 2 | 1 | 6 | 12 | 29 | -17 | 7 |
| 9 | B68 | 9 | 1 | 2 | 6 | 10 | 22 | -12 | 5 |
| 10 | TB | 9 | 0 | 2 | 7 | 6 | 27 | -21 | 2 |

WWW.FAROESOCCER.FO

## 10. UMFAR

| | |
|---|---|
| 13.05.21 | TB - NSÍ |
| 13.05.21 | 07 Vestur - KÍ |
| 13.05.21 | ÍF - B36 |
| 13.05.21 | B68 - Víkingur |
| 13.05.21 | EB/Streymur - HB |

## 11. UMFAR

| | |
|---|---|
| 16.05.21 | ÍF - EB/Sreymur |
| 16.05.21 | B36 - 07 Vestur |
| 16.05.21 | KÍ - B68 |
| 16.05.21 | Víkingur - TB |
| 16.05.21 | NSÍ - HB |



# 9. UMFAR

TEKST: **EIVIN BREIÐASKARÐ**
MYNDIR: **ÁLVUR HARALDSEN**

Eftir eina góða byrjan uppá kappingarárið 2021, har okkara dreingir við Ólavi Larsen, høvuðsvenjara á odda, so eru úrslitini síðstu umførini blivin meira neilig, har ÍF hevur tapt 4 av 5 dystum, og bert hevur fingið 1 stig í 2-2 javnleikinum á Tórsvølli ímóti B36 sunnudagin 2.mai.

Sunnudagin 9.mai varð farið útum Varmakeldueiði, har ljósabláa felagsliðið úr Eysturkommunu bíðaði í Sarpugerði til eina grannauppgerð ímóti reyð/hvítu ÍF. Hetta eigur at verða ein dystur, har tað eigur ein sjálvfylgja, at motivatiónin er í topp.

Sigast skal, at í byrjunaruppstillingini hjá ÍF vórðu 3 leikarar úr Fuglafirði, umframt Karl Løkin, sum hevur búð í Fuglafirði í nøkur ár og eisini hevur nokkso fitt av kappingarárum sum ÍF-leikari. Víkingur stillaði upp við 9 lokalum leikarum. Einastu avbygdamennirnir í byrjunaruppstillingi, vóru Jákup Johansen av Skála (býr í Fuglafirði), og Noah Mneney sum er úr Fuglafirði.

Dysturin byrjaði nakað javnt, og liðini føldu hvønn annan eitt sindur av fyrstu minuttirnar. Intensiteturin varð eisini frá fyrsta bríksli av, og onkrir nærdystir vóru, sum hoyra tílíkari grannauppgerð til. Tildømis varð ein leikari sum Bogi Reinert Petersen sera ákoyrandi fyrstu løtuna, og hann fekk eisini eitt gult kort eftir einans 18 minuttir.

Víkingur legði seg á odda eftir 20 min, tá ið Andreas Lava Olsen fekk eina sending inn um ÍF-verjuna, og hegnisliga lyfti hann bóltin forbí Martin í ÍF-málinum.

Eftir 27 minuttir varð Lava aftur uppá spæl, tá ið hann so sera væl knallaði bóltin í málið hjá gestunum umvegis stongina. Eitt sera gott mál frá Andreas Lava Olsen, sum nú er toppskorari í Betri-deildini.

ÍF hevði onkran hálvan møguleika í fyrra hálvleiki, uttan at tað bleiv av álvara vandamikið. Tað varð sostatt 2-0 til heimaliðið, tá ið farið varð til hálvleiks.

Tað varð sum um, at ÍF-leikararnir høvdu fingið ein uppsang í hálvleikinum, og liðið legði væl frá landi í seinna hálvleiki og longu eftir 53 min minkaði ein tann mest markanti leikarin hjá IF, Gundur Petersen til 1-2, tá ið hann sera hegnisliga fluktaði bóltin í málið hjá Vikingi. Gundur sær út til at fara at hava eitt gott kappingarár, um hann heldur fram í sama stíli restina av kappingini.



við nærru stong. Eitt gott mál av einum royndum og dugnaligum leikarar, sum er snúvningspunktið á Víkinga-liðnum.

Úrslitið á 5-1 endurspeglar nokk veruliga munin á liðunum, har Víkinga-leikararnir vildu tað meira enn okkara dreingir. ÍF og Víkingur spæla í Fløtugerði í Løgmannsteypinum 30.mai, og skal ÍF hava nakran kjans at vinna tann dystin, so má annað skinn um bak og spælast skal við hjartanum uttaná blusuni!!!!!



# TEAM

| | |
|---|---|
| Martin **Danielsen** (M) | 1 |
| Gunnar **Christiansen** | 2 |
| Jan Ó. **Ellingsgaard** | 3 |
| Jens **Joensen** | 4 |
| Ólavur **Niclassen** | 5 |
| Karl A. **Løkin** (L) | 6 |
| Bogi **Reinert-Petersen** | 7 |
| Uros **Stojanov** | 8 |
| Filip **Djordjevic** | 9 |
| Ari Ó. **Ellingsgaard** | 10 |
| Steinbjørn **Olsen** | 11 |
| Hans Jákup **Lervig** | 12 |
| Jákup **N. Olsen** (M) | 13 |
| Gundur **E. Petersen** | 14 |
| Jákup **í Lambanum** | 15 |
| Poul N. **Mikkelsen** | 16 |
| Sámal **Joensen** | 17 |
| Pól Jákup **Lundsbjerg** | 18 |
| Jóhann **Højbro** | 19 |
| Aron **Kensson** | 20 |
| Tóri **N. Olsen** | 21 |
| Elias **Lervig** | 22 |
| Emil W. **Joensen** | 23 |
| Bjarti **Højbro** | 24 |
| Rúnar **Johnsson** | 25 |
| Líggjas **Heðinsson** (M) | 26 |
| Petur M. **Lundsbjerg** | 27 |
| Dávid **Petersen** (M) | 28 |




Hans Jákup **Lervig**

**Leikarin hesarferð**




| | |
|---|---|
| Ólavur **Larsen** | VENJARI |
| Agnar **Prestá** | HJÁLPARVENJ. |
| Pauli **Jarnskor** | MÁLMANSVENJ. |
| Sonni **Eliassen** | FYSISKUR VENJ. |
| Niklas **Reginsson** | FYSIO |
| Palli **Vang** | LIÐLEIÐARI |
| Trugvi **Nesá** | LIÐLEIÐARI |
| Dan **Petersen** | LIÐLEIÐARI |

# TEAM

FÓTBÓLTSFELAGIÐ B36 F.C. TÓRSHAVN

| | |
|---|---|
| Rói **Mørk Hentze** (M) | 1 |
| Andrias **H. Eriksen** (L) | 2 |
| Magnus **Holm Jakobsen** | 3 |
| Bjarni **Petersen** | 4 |
| Lukas **Enevoldsen** | 5 |
| Eli **Falkvard Nielsen** | 6 |
| Bjarki **Nielsen** | 7 |
| Mathias **Thrane** | 8 |
| Hannes **Agnarsson** | 9 |
| Tobias **Christensen** | 10 |
| Benjamin **Heinesen** | 11 |
| Alex **Mellemgaard** | 12 |
| Hugin **Samuelsen** | 15 |
| Símun Rógvu **Hansen** (M) | 16 |
| Mattias **Joensen** | 24 |
| Brian **Jakobsen** | 25 |
| Sebastian **Pingel** | 30 |
| Ragnar **Samuelsen** | |
| Mattias **Lamhauge** (M) | |
| Martin **Agnarsson** | |
| Erlendur **Magnusson** | |

| | |
|---|---|
| **VENJARI** | Dan **Brimsvík** |
| **HJÁLPARVENJ.** | John **Petersen** |
| **HJÁLPARVENJ** | Róaldur **Jakobsen** |



## DÓMARI

Kári J. **á Høvdanum** **(Syðrugøta)**

## 1. HJÁLPARDÓMARI

Petur Páll **Winther Hentze** **(Norðagøta)**

## 2. HJÁLPARDÓMARI

Jón Marni **Johannesen** **(Skála)**

## 4 DÓMARI

Petur **Reinert** **(Leirvík)**

## EYGLEIÐARI

Niklas **á Líðarenda** **(Norðagøta)**




TEKST: **SIGNAR Á BRÚNNI**

# HVAT BAGIR ÍF LIÐNUM?

**ÌF liðið spældi ein vánaligan dyst móti B68 á Svangaskarði.**

So spældi sama ÍF liðið móti B36 í Gundadali og spældi javnleik.

Dystirnir ímóti Víkingi eru aloftast rættiliga javnir, men í dag gekk syndarliga illa, lið okkara tapti 5-1 , ið var eyðmýkjandi fyri liðið og ÍF stuðlarnar.
ÍF stuðlar standa spyrjandi: „Hvussu ber tað til, at liðið er so skiftandi við so at siga sama fólki hvønn dyst?“

Á liðnum eru nógvir góðir spælarar, og liðið kann í løtum spæla góðan og vakran fótbólt, tað hevur liðið so mangan víst.

Men dysturin í dag var út av lagi vánaligur, lítið og einki eydnaðist, meðan næstan alt eydnaðist hjá mótstøðuliðnum av mistøkum, ið okkara lið gjørdi. Fyrstu tvey málini fekk Víkingur, ið frægi spælarin Andreas Lava skeyt. „Hví hevði ÍF liðið ikki eyguni eftir hesum manni, ið megnar meira enn nakar annar spælari í bestu deildini?“

Málini, ið hann gjørdi, vóru framúr, og hann hevði so sannilga ríkiligt av plássi, ið góvu honum møguleikarnar at seta bóltin í netið. Her vantaði skilagott verjuspæl.

Sjálvandi seta venjarar og spælarar seg niður og gjøgnumganga dystin í Gøtu, og syrgja fyri, at somu mistøk verða ikki gjørd næsta dyst móti B36 í Fløtugerði hósdagin.

B68 liðið hevur ment seg ótrúliga nógv, nú teir eru í bestu deildini. HB vann á B68 við einum máli, ið var eitt sjálvmál. Toftamenn stríddust sum fyri lívinum.

**Kunnu fuglfirðingar ikki gera tað sama?**

**»Sjálvandi kunnu teir tað við at spæla skjótari og við einum skilabetri spæli, enn liðið vísti ímóti Víkingi.«**

Hóast mótburð so missa vit ikki mótið.

Okkara lið megnaði at spæla javnleik móti B36 í Gundadali fyri stuttum, so eigur liðið at vinna á sama liði í Fløtugerði hósdagin.

Dyggu ÍF fjepparnir møta til dystin, teirra stuðul fer ikki at liggja eftir.

Green Marine Divers

Tlf.: +298 77 00 60




HOTEL BRANDAN



ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

# TOPP10

## MÁLSKJÚTTAR Í BETRI-DEILDINI

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Andreas **Olsen** (Víkingur) | 9 |
| 2 | Páll **Klettskarð** (KÍ) | 8 |
| 3 | Mikkel **Dahl** (HB) | 7 |
| 4 | Dan **í Soylu** (HB) | 6 |
| 5 | Petur **Knudsen** (NSÍ) | 6 |
| 6 | Uros **Stojanov** (ÍF) | 6 |
| 7 | Adrian **Justinussen** (HB) | 5 |
| 8 | Jonn **Johannessen** (KÍ) | 4 |
| 9 | Sølvi **Vatnhamar** (Víkingur) | 4 |
| 10 | Bjarki **Nielsen** (B36) | 3 |

WWW.FAROESOCCER.COM




UROS



teknistovan GØTA

Jens Kl. Jacobsen
Far.: jkj 232343

Henning Olsen
Far.: ho 232344

FO 510 Gøta tel. 442344 teknistovan@teknistovan.fo www.teknistovan.fo

**Nýggj og slóðbrótandi jarðhitapumpa**

***Thermia Calibra hevur upp í 5,8 SCOP***



SK SVENDKROSSTEIN

Les meir á Krosstein.fo

Thermia



## LEIKARIN HESAFERÐ

**Navn:** Hans Jákup Lervig.
**Føðingardagur:** 26/02/1997.
**Føðistað:** Tórshavn.
**Starv:** Lesandi.
**Pláss á vøllinum**: Vongur og bakkur.
**Yvirtrúgv:** Fleiri ferðir á vesi áðrenn dyst.
**3 orð sum lýsa teg:** Raskur, treiskur og ágrýtin.
**Torførasti mótstøðumaður:** Sølvi Vatnhamar.
**Vónir fyri 2021**: Steypafinalan
**Fyrsti dystur á 1. liðið:** 19. mars 2017 við Víkingi ímóti NSÍ við Løkin.

**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:**
16. juni 2019 ímóti HB í Fløtugerði.
**Størstu fótbóltsliga ávirkan:**
Sølvi Vatnhamar og Atli Gregersen.
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** Hondbólt.
**Hvat slag av venjing dámar tær best:**
Interval og dyst.
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:**
Taktiskar venjingar.

## TÍNIR FAVORITTAR:

**Matur og drekka:** Ræst kjøt við einari kaldari, slær ikki feil.
**Slag av tónleiki:** Rock 'n' Roll.
**Sjónvarpssending:** Beint nú er tað Sons of Anarchy.
**At slappa av:** Hyggja eftir onkrari sjónvarpssending.
**Trøyggja nr.:** 12
**Besti fótbóltsleikari nakrantíð:** Lionel Messi.
**Sjónvarp/filmstjørna:** Tom Hanks.
**Besta bók/blað:** Gula bók til støddfrøði.
**Stuttligasti persónur:** Jimmy Carr.
**Stuttligasti í hópinum:** Ari.
**Besti ÍF áskoðari:** Jack Toftegaard.

Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG

SAMSKIP

SPEKT
løggildir
grannskoðarar

**Tórshavn**
Staravegur 17
Tel. 34 34 34

**Klaksvík**
Stangaskákið 1
Tel. 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo






# INNIHALD



TEKST: **MARTA SÓLHEIM THOMSEN**

# ÍF-KVINNUR 2021

**Tá ið kappingarárið 2020 var liðugt, var greitt at felagsliðið ÍVB (ÍF, Víkingur, B68) eisini var søga.**

Tá ið ÍF og Víkingur tóku upp samstarv í 2014, var ongin ætlan gjørd um, hvussu longi samstarvið skuldi varða. Bæði feløgini vóru tá í teirri støðu, at ongin kláraði at mannað eitt kappingarført lið, og tí varð avgjørt, at stovna eitt felagslið. Samstarvið hevur sum heild eydnast væl, bæði á, og ikki minst uttanfyri vøllin.

Nú er tíðin aftur komin, til at standa á egnum beinum. Fyri fyrstu ferð síðani 2013, ber til at síggja kvinnufótbólt, við ÍF, í Fløtugerði. Vit hava sett okkum sum mál, at byggja upp av nýggjum, og nógv er lagt fyri. Liðið er meldað til í 1. deild, sum er næstbesta deildin hjá kvinnum.

Nevndin hevur sett brasilianska, vágamannin, Alexandre da Silva Braga (Silva), sum høvuðsvenjara. Okkara egni brasilianari, Alex Jose Dos Santos, kemur at hjálpa honum.

Tað eru uml. 25-30 kvinnur, sum vilja gera seg galdandi, bæði ungar, og minni ungar. Men tørvur er á øllum kreftum, bæði ungum, evnaríkum og orkufullum leikarum, men eisini eldri, royndum leikarum, sum kunnu tryggja eitt støðugt lið.

**Leiðandi reiðarí**
**í norðurhøvum**




VARÐIN
P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tel 610600
vardin@vardin.fo | www.vardin.fo

OKKARA KJARNUØKI

GRANNSKOÐAN
ROKNSKAPARHJÁLP
SKATTUR
VIRKISRÁÐGEVING
BÓKHALD
MEIRVIRÐISGJALD



Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO




# INNIHALD

Fram til kappingarbyrjan, hava venjingarnar gingið væl, og uppmøtingin hevur verið sera góð – og hetta er gleðiligt.

Vit hava spælt 2 dystir í landskappingin. 1. dystur varð spældur á heimavølli 28. mars 2021, ímóti MB. Talan var um einvegis ferðslu, og vit komu frá byrjan við einum 10-0 sigri. Hetta var eitt sera gott úrslit, tí hetta var fyrsti dystur hjá nýggja liðnum, yvirhøvur. Ætlanin var at fáa nakrar venjingardystir, áðrenn kappingarbyrjan, men veðrið og kavin gjørdu, at hetta bleiv av ongum.

Næsti dystur var eisini á heimavølli, ímóti KÍ. Dysturin endaði 3-3, eftir hálvleiksstøðuna 1-3. Í hesum dystinum møttu vit munandi harðari mótstøðu, enn í fyrsta umfari. Men tað var týðiligt at síggja, at liðið hevði ment seg nógv, til hendan dystin, og megnaðu vit at svarað aftur í 2. hálvleiki, og fáa ein javnleik í hús.

3. umfar var leikt á Skála, har mótstøðuliðið EB/-Streymur/Skála tók ímóti. Talan var um ein spennandi og javnan dyst. Vit løgdu okkum á odda tíðliga í dystinum, og øktu um leiðsluna í fyrra hálvleiki. Heimaliðið minkaði tó um leiðsluna í fyrra hálvleiki,

soleiðis at hálvleiksstøðan var 1-2, til okkum. Í seinna hálvleiki hevði EB/Str./Skála yvirvág, og endaðu eisini við at vinna dystin 3-2.

## Vónir fyri kappingarárið 2021

Tað er trupult at seta mál, til eitt spildur nýtt lið. Vit taka 1 dyst í senn, og so síggja vit hvussu langt tað ber. Málið er at fáa eitt væl samanspælt lið, sum støðugt

# STØÐAN

## EFTIR 5. UMFAR

**1. deild Kvinnur**

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB II | 5 | 4 | 0 | 1 | 25 | 2 | +23 | 12 |
| 2 | TB/FCS/Royn | 5 | 4 | 0 | 1 | 17 | 3 | +14 | 12 |
| 3 | EBS/Skála II | 4 | 3 | 0 | 1 | 13 | 5 | +8 | 9 |
| 4 | NSÍ II | 5 | 3 | 0 | 2 | 8 | 9 | -1 | 9 |
| 5 | ÍF | 5 | 2 | 1 | 2 | 19 | 9 | +10 | 7 |
| 6 | Víkingur II | 5 | 2 | 1 | 2 | 7 | 9 | -2 | 7 |
| 7 | B36 II | 5 | 2 | 0 | 3 | 22 | 11 | +11 | 6 |
| 8 | AB/B71 II | 4 | 1 | 1 | 2 | 5 | 4 | +1 | 4 |
| 9 | KÍ II | 5 | 1 | 1 | 3 | 6 | 28 | -22 | 4 |
| 10 | MB | 5 | 0 | 0 | 5 | 0 | 42 | -42 | 0 |

# SINGIÐ VIÐ

Í Fuglafirði mangan dystin leika
Í reyðum, hvítum klæðum eru tit
Á vølli allir leikarar nú reika
Og vinna dystin – ja, tað vilja vit.

**Vit eru ÍF-fan**
**Vit vita hvat ein kann**
**Vit eru best, og vinna hvat sum helst**
**Vit hava sett sum mál, at vinna hvørja sál**
**Nú Fuglafjørður hevur nátt sítt mál.**

Í deildini vit skulu verða bestir
Og vinna alt ið vinnast kann í dag
Jú, ÍF-leikarar teir eru treystir
Og fólkini tey gerast øll so glað.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Á vøllinum vit skulu standa saman
Um tað nú ikki gongur sum tað skal
Á bakkanum í álvara og gaman
Og vóna at tað gondur okkum væl.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Vit armarnar í lofti nú upp hevja
Og kunnu ikki standa her í frið
Tá sjálvandi vit gullið kunnu tevja
Nú eiga vit jú Føroya besta lið.

**Vit eru ÍF-fan ...**



LEYGARKVØLDIÐ 15. MAI 2021

# FJEPPARA KVØLD Í PATRICK'S

**18.00** Vit grillað pylsur og burgarar – 20 kr.

**19.00** Syngið við – við Njal

**21.00** Pub Quiz – tvey tey fyrstu umførini eru við søguligum ÍF spurningum burturav.

**23.00** Uppboðssøla av útvaldum 75 ára spæliblusum hjá Betri monnum:
21 Tóri - 9 Filip - 14 Gundur - 7 Bogi - 17 Sámal - 6 Karl
18 Pól Jákup - 3 Jan Ó. - 13 Jákup N. - 8 Uros

**24.00** Signar í Homrum undirheldur

**MØTIÐ FJØLMENT – OG GJARNA Í ÍF KLÆÐUM.**

**INNIHALD**